Tórhallur:

# Lumpaði mammu sína fyri at sleppa burtur

**Nú nærkast tíðin, tá ið Tórhallur hevur aldur at fara burtur sum aðrir dreingir. Men kríggj var, og mamman hevði ongan hug at lata hann fara nakran veg. Her mátti Tórhallur brúka snildir. Hann kom tískil at vera millum teir síðstu, sum var saman við manningini á Verdandi, áðrenn hon fór lagnutúrin í 1944, tá ið teir hvurvu**



Verdandi við bryggjuna á Høgabóli

**4. Partur**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

## Móstøðan

Í næstseinasta partinum greiddi Simona, systir Rigmor, frá um, tá ið kræklingur var gerandismatur. Her kann verða skoytt uppí, at Móstøðan var eitt serligt øki har norðuri við nógvum kræklingi. Tað var gamalt, at hon var mett sum ein mørk í jørð. Tá ið mjólk var til avlops, plagdi hon at verða stoytt í opna skel. Tá skuldi kræklingurin gerast so sera feitur. Seinni gjørdist stríð um Móstøðuna, tá ið menn eisini fóru at nýta hana til agn, og menn fóru at óttast fyri, hvussu burðardygt hetta var.

## Var eisini motorpassari við slupp

Eg beundri mangan pápa fyri, hvussu væl hann dugdi at manøvrera, og hann lærdi okkum eisini væl. Tá ið vit vóru eini tíggju ár, fóru vit við maskinbátinum, og tá ið vit vóru eitt sindur størri, sluppu vit við motorbátinum og fingu møguleika at manøvrera við honum.

Pápi sigldi eisini nógv sum motorpassari við slupp. Hann var í nógv ár við eini slupp, Dagny, sum var av Eiði. Pápi ætlaði sær eina ferð av fyri at fara við einum øðrum skipi, men tá hava teir vist bjóðað honum okkurt eyka, so hann endaði aftur við Dagny. Teir, sum áttu hana, vóru handilsmaðurin Øster og skiparin Óla Jákup av Sandi, sum var giftur til Eiðis. Seinni flutti hann niður og keypti ein bóndagarð, og hann hevði tað gott niðri. Tá vildi hann gevast at sigla og royna okkurt annað. Føroyingar hava ofta víst seg at vera sera fjølbroyttir, tá ið tað snúði seg um arbeiði. Óla Jákup av Sandi var ein ógvuliga behagiligur maður.

## Lumpaði mammu at sleppa til skips

Eg hevði akkurát fylt 15 ár, tá ið eg fór burtur, men har mátti eg brúka snildir.

Undan jólum 1943 kom eitt systkinabarn mítt í Íslandi Gunnlaug, kallaður Gylli, til okkum at vera eina tíð. Hann var 12 ára gamal og kom heim við sluppini Sigurfari. Hann hevði altíð gingið umborð á sluppunum, tá ið tær komu inn, sum íslendskir dreingir ofta gjørdu tá, so hann dugdi væl føroyskt. Hann var í Føroyum umleið eitt ár, tá fór hann til Íslands aftur. Hann gekk í skúla við Norðskála. Hóast vit vóru so nógv systkin, var eisini pláss fyri honum. Har tað er hjartarúm er sum kunnugt eisini húsrúm.

Eg bað hann skaffa mær kjans við einum útróðrarbáti har yviri, tá ið hann fór avstað aftur og at siga mær frá aftur. Eg var tá akkurát fyltur 15 ár. Tað mundi ganga ein mánaði, tá kom telegramm, men tað kundi eg eins væl ikki fingið.

Eg hevði verið suðuri í fjøruni og skotið tamspógvar. Eg fekk tveir og mátti leypa á sjógv fyri at fáa hendur á teir og fekk karm. Tá ið eg kom inn í gongina setti eg meg á trappuna, sum gongur uppá loft, at lata meg úr hosunum. Tá hoyri eg mammu siga inni í køkinum: "Nú má eingin tala um telegrammið hjá Tórhalli". Eg lati hurðina upp, og spyrji mammu, um eg hevði fingið nakað telegramm. "Nei, góði, tú hevur einki telegramm fingið, og eg vænti ikki, at tú fær nakað telegramm". So ringdi eg sjálvur á telefonstøðina og spurdi. Jú, víst var eitt telegramm komið til mín, og so lósu tey tað upp. Boðini vóru, at systkinabarnið hevði skaffað mær pláss við einum báti. Tað var hetta, sum mamma als ikki vildi, at eg skuldi fara.

Men fara tað vildi eg. Eg fór so til Havnar at gera meg kláran. Eg skuldi millum annað hava pass og passmynd sum kravdist tá. Eg fór til Íslands við Acorn, sum fór yvir at keypa fisk til at selja í Bretlandi.
Vit fara av Havnini, og sigldu einar 50 fjórðingar eystur úr Fugloynni fyri at koma útum minufeltið. Hetta er einastu ferð, eg havi havt sjóverk. Acorn hevði ligið fyri teym allan veturin, og tá ið røringur kom í fór at lukta úr kjølinum. Tað er nógvir fiskimenn, serliga ungir dreingir, sum minnast ilt á slíkan pumpuroyk, sum tað varð kallað. Tá ynskti eg mær at vera heima aftur



Sildaarbeiði á Oyri